


*Birgir Waag Høgnesen og Magnus Gunnarsson í útvarpsstovuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bilradio á Rás2

**Síðan vit yvirtóku Rás2, hava vit arbeitt miðvíst við at fáa nýggjar sendingar á skránna, og ein av hesum er bilsendingin Bilradio, sigur Birgir Waag Høgnesen, sum samskipar sendingar og lýsingar á Rás2**

Bilradio er ein sending, har dentur verður lagdur á at at hava fleiri ymisk innsløg í hvørjari sending við tilfari um alt sum hevur við motorakfør og ferðslu at gera. Umframt at dendur verður lagdur á góðan tónleik í sendingini.

Í sendingini eru t.d. biltíðindi úti og heima, prát við bila- og motorsúkklusølur um hvat rørir seg á marknaðinum, hvørji nýggj modell eru á veg og hvørji selja best í løtuni o.s.fr.

Sosialurin hevur umframt Bilradio á Rás2 eisini biltilfar í Sosialinum hvønn mikudag. Ætlanin er at gera meira við biltilfar við t.d einum portali, sigur Birgir Waag Høgnesen, marknaðarleiðari á Rás2.

Bilradio verður sent hvønn hósdag kl. 16 og verður endursent fríggjamorgun millum kl. 8 og 9 og leygardag kl. 13.

**Bilradio á Rás2**

**Bilradio verður sent hósdagin millum kl. 16 og 17, og endursent fríggjadag millum kl. 8 og 9, og leygardag kl. 13**